131a

# Á, hvør er hasin maður

131a

Brynleif Hansen

Øssur Berghamar




Á, hvør er hasin maðurmaður, ið krossin bera má?
Vanvirdur, niðurboygdur, má líða spott og háð!
Jú, hatta er Guds sonur, við tornum krýndur fer
við sigri inn í deyðan og mínar syndir ber.

Ja, fyri mínar misgerðir soraður tú varð,
og fyri míni lógbrot ta hvøssu krúnu bar.
Tín máttur upp nú tornar, tín tunga loðar føst,
sum vaks títt hjarta bráðnar, tú pínur mínar tókst.

Tú, Leyvan, rótskot Dávids, tú hevði alla makt,
sum lamb tú bart tað stillur og toldi alt forakt.
Tú kærleiksfulli maður til krossin negldur varð,
ja, mína straff tú toldi og mínar sjúkur bar.